Nr.

Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Skattlig javnseting av persónum við framskundaðari pensjón og fyritíðarpensjónistum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 144 frá 13. desember 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 3 verður orðað soleiðis:

"**§ 3.** Hvør persónur, sum er undir fullari skattskyldu eftir reglunum í § 1 í skattalógini, og sum er 67 ár ella eldri, ella fær fyritíðarpensjón, framskundaða pensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt. Persónur, sum fær fólkapensjón, hevur tó ikki rætt til hendan frádrátt.
Stk. 2. Frádrátturin fyri giftar persónar er 10.500 kr.
Stk. 3. Frádrátturin fyri stakar persónar er 16.200 kr.
Stk. 4. Persónur, sum fær fólkapensjón sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt.
Landsskattafrádrátturin er upp til 1.500 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 1.500 kr. um árið."

2. § 3 verður orðað soleiðis:

"**§ 3.** Persónur, sum fær fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón, fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt.
Stk. 2. Frádrátturin fyri giftar persónar er 10.500 kr.
Stk. 3. Frádrátturin fyri stakar persónar er 16.200 kr.
Stk. 4. Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt.
Landsskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið."

§ 2

Stk. 1. § 1, nr. 1 kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2020.
Stk. 2. § 1, nr. 2 kemur í gildi 1. januar 2021.

§ 3

Broytingin í § 1, nr. 2 er bert galdandi fyri persónar, sum fylla 67 ár 1. januar 2021 ella seinni.

Samtykt á Løgtingi hin 8. desember 2020 við 28-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 8. desember 2020

stjóri

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

LM-045/2020